## DAGSINS MEINING

# Ungdómsting og fólkaræði

Tað er eitt frálíkt hugskot at halda ungdómsting í løgtingshúsinum. Ungdómstingið, sum í hesum døgum verður hildið, gongur fyri seg mestsum á sama hátt sum, tá fólkavaldu tinglimirnir halda ting. Demokratiið ella fólkaræðið er nakað av tí mest virðismikla, ið vit eiga. Vit eiga øll at verja og menna fólkaræðið hvønn dag. Fólkaræðið er viðkvæmt og má at røkjast væl og virðiliga. Kanska hugsa vit ov lítið um hetta í gerandisdegnum og kanska fara vit ikki altíð nóg væl um fólkaræðið.

Strevið at styrkja og menna fólkaræðið eigur at vera útinnt á øllum økjum og til allar tíðir. Ein týðandi liður er at gróðurseta fólkaræðið í tí uppvaksandi ættarliðinum. Hetta verður vónandi gjørt dagliga í skúlunum við tað, at eitt endamálið við fólkaskúlanum er at venja børnini upp til demokratiskt hugsandi menniskju. Demokrati er ikki nakað, sum bert er til staðar í politikki, eitt nú á løgtingi og í bý- og bygdaráðum. Demokrati ella fólkaræði er ein partur av okkara mentan og eigur at vera ein natúrligur partur av okkara gerandisdegi. Demokrati er at virða hvønn annan og at virða meiningar og sjónarmið hjá hinum, hóast ósemjur og ymisk sjónarmið. Demokrati er orðaskifti og upplýsing, samhaldsfesti úti sum heima. Í hesum døgum verður samhaldsfesti okkara sett undir harða roynd, nú ein stórur partur av tí heimi, sum hevur brúk fyri okkara samhaldsfesti, vendir sær móti okkum við hóttanum og rakstrarrópum.

Tað er við hesum baksýni, ið vit skulu síggja eitt fyribrigdi sum ungdómstingið. Á ungdómstinginum kunnu nøkur ung fáa innlit í bygnað og virksemi fólkaræðisins. Tey kunnu fáa innlit í, hvussu okkara fólkaræði virkar. Tey eins og vit onnur kenna jú bert politisku skipanina gjøgnum fjølmiðlarnar. Men hesir megna bert at vísa okkum ein part av øllum tí sera samansetttu og fjøltáttaðu skipan, sum eyðkennir okkara fólkaræði. Vónandi fáa tey ungu bæði áhuga fyri grundleggjandi fólkaræðisligum spurningum, virðing fyri sjálvum fólkaræðinum og fatan av teimum fortreytum, sum fólkaræðið virkar undir. Vónandi fara hesi dámligu ungufólk út til sínar vinir og skúlafelagar og greiða frá øllum, ið tey hava uppliva hesar báðar dagrnar á Føroya løgtingið. Gera tey hetta, so er mikið vunnið bæði fyri sjálvt fólkaræðið og fyri føroyskan ungdóm.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skelkaður, eg má gera Høgna'sa orð til míni



GERHARD LOGNBERG
Løgtingsmaður

**Gerhard Lognberg sigur sær ikki ætla at forða andstøðuni í at føra politikk. Men hann heitir á Høgna Hoydal um at halda seg til sannleikan, tá hetta verður gjørt**

Í tinginum nú um dagarnar hevði Høgni Hoydal fyrispurning til Bárð Nielsen landsstýrismann.

Einki løgið er í, at spurningar verða settir. Tað er jú vanligt, at andstøðupolitikarar seta nógvar spurningar, tí tað er teirra máti at føra politikk, hetta er vanligt.

Men Høgni Hoydal, má eg siga er ekstremur. Eg nevndi undir orðaskiftinum í tinginum, tá spurningurin var svaraður, at skattalættin sum verandi samgonga hevur latið, er nøkurlunda tað sama sum hansara samgonga læt heilt líkt, tað síðsta árið av skeiðnum.

Høgni bað meg prógva hetta eg segði um skattalætta. Nú virkar Høgni soleiðis uppá meg, at hann kann kasta allar pástandir um seg, og meinar at tað kann hann, men tá onnur opnað munnin, ja so skal tú syrgja fyri at prógva tað tú sigur.

So kemur tað sum serliga fekk meg at skriva nakrar reglur, har ið Høgni beinleiðis segði ósatt á tingsins røðarapalli.

Eg segði undir orðaskiftinum, at eg tordi ikki at siga á røðarapallinum at hann leyg, men segði um tað var frægari, at hetta var ein loddrøtt.

Líkamikið, Høgni Hoydal skrivaði í fyrispurninginum, at skattaprosenti í Skopun og Vági er 24,5 %.

Eg má hart og týðiliga afturvísa slíkum pástandi, sum eru rætt og slætt lygusøgur, fyri at royna at niðurgera fólk, sum mann ikki er samdur við politiskt.

Nei, Skopunar Kommuna hevur ikki eitt skattaprosent sum eitur 24,5, men 23,5 so í veruleikanum lækkaðu vit skattaprosentið og hækkaðu barnafrádráttin, um hetta skuldi havt tín áhuga.

Eg má siga, at eg persónliga føldi hetta niðrandi, um so var at Høgni Hoydal brúkti røtt tøl, ja so hevði eg einki sagt.

Eg eri ikki í iva, at nettup hetta við at seta hetta skattaprosentið, var við beráddum huga, tí um hetta ikki bleiv afturvíst, ja so hevði Høgni klára at skatt umdømi hjá hesum kommununum.

Men Høgni, eg ætli í hvørfall ikki at forða tær í tínum andstøðupolitikki, eri heldur ikki førur fyri tí.

Men halt teg so nøkurlunda til sannleikan.

# Sprokspalta



EYÐUN Á BORG
Argir

***Stadigvekk er forhopentliga ikki føroyskt!***
**– Framvegis er vónandi føroyskt!**

STADIGVEKK (málspilla nummar 1!?): Stadigvekk man vera ein tann herviligasta málspillan í føroyskum máli! Eisini forhopentliga, men hon hoyrist kanska ikki so ofta!

Stadigvekk, hetta margháttliga orðið, hoyrist hvønn einasta dag, bæði í Útvørpunum og í dagligari talu millum manna.

Næstan øll siga stadigvekk: Løgmaður, landsstýrismaður, løgtingsmaður, lærari, løgfrøðingur, løgreglumaður, lækni, listarmaður, ja, leikur og lærdur!

Løgið, at so nógv lata sær lynda, at okkara leikandi lætta móðurmál verður lamløstað við slíkum lættisoppakendum láglandsorðum!?

STADIGVEKK: Framvegis, enn, alsamt, við sama lag! FORHOPENTLIGA: Vónandi, stutt og greitt!

*eydun.a.borg@skulin.fo*

# Almennur fyrispurningur til Gerhard Lognberg



HERGEIR NIELSEN
Løgtingsmaður

Samgongan fór beinanvegin undir at pumpa 240 mió kr. upp úr landskassanum í skattalættum hesi fýra árini, hon situr við valdið, meðan líknandi upphædd seyrar úr sama kassa í halli á hvørjum ári.

Gerhard Lognberg vil ikki kennast við tølini, ið eru frammi um skattalættar í Skopun og í Vági.

Kann hann sum lógarsmiðjur gera so væl at siga okkum, hvat inntøkur upp á 170.000 kr. í Skopun og í Vági fáa í skattalætta eftir semjuni í samgonguni?

Kann hann so eisini siga okkum, hvat inntøkur upp á 600.000 kr. á somu støðum fáa í skattalætta?

Heldur Gerhard Lognberg, at mannamunur verður gjørdur, nú hendan fjórðings milliardini verður lensað úr landskassanum?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.